Sambandsflokkurin
Samband við framtíðina

Tórshavn tann 1. september 2011

# VALSKRÁ TIL FÓLKATINGSVALIÐ 2011

## RÍKISFELAGSSKAPURIN - EIN HORNASTEINUR



Føroyingar skulu til komandi fólkatingsvalið gera av, hvørt vit komandi árini framhaldandi skulu styrkja og menna ríkisfelagsskapin.

Ríkisfelagsskapurin prógvaði sítt virði sum hornasteinur, serliga tá eitt trygdarnet varð spent undir føroyska fíggarkervið, og kundar og bankar vórðu fíggjarliga tryggjað. Harafturat hevur Ríkið nýliga latið stuðul til nakrar stórar føroyskar verkætlanir, sum eru við at gerast veruleiki. Veittur verður eisini ein ríkisfelagsfrádráttur fyri lesandi. Somuleiðis sum árliga ríkisveitingin er við til at tryggja ein støðugan samfelagsbúskap.

Við útgangsstøði í verandi trupulleikum í samfelagsbúskapinum og møguleikum fyri strategiskari menning, heldur Sambandsflokkurin, at eitt tætt samstarv í ríkisfelagsskapinum er viðvirkandi til, at vit koma bæði lættari, skjótari og tryggari úr trupulleikunum og kunnu aftur skapa vøkstur. Tí fer Sambandsflokkurin til val uppá og ætlar at seta fokus á nøkur ítøkilig øki, sum kunnu gagna føroyska samfelagnum munandi komandi árini.

- Gera meira brúk av teimum **stórrakstrarfyrimunum**, sum ein ríkisfelagsskapur kann hava við sær, td. sendistovur, integratiónsmál, tvískattaavtalur, vinnulóggávu, verjumál og rættarmál
- Menna og varðveita **útbúgvingarmøguleikar og stuðulsmøguleikar** fyri føroyingar, sum útbúgva seg í Danmark og aðrastaðir
- Tættari samstarv um **sjúkra- og heilsuviðgerð** - serviðgerðir
- **Samstarv um búskaparmenning** – eisini í norðurlendskum høpi - um menning av nýggjum orkukeldum, menning av ferðavinnu, skapa betri forteytir fyri fólkavøkstri o.a.
- Saman við donsku stjørnini tryggja føroyska samfelagnum og vinnuni ein nútímans **ES-sáttmála**, sum styrkir samfelagsbúskapin og er við til at skapa arbeiðspláss – ríkisfelagsskapurin skal verða við til at skunda undir altjóðaagerðina
- Menna møguleikarnar at verða partur av donskum **ígongdsetara- og stuðulskipanum**, sum vinnulívið kann njóta gott av
- Brúka møguleikan fyri stuðli til at styrkja **havgransking** á Havstovuni – menna ein havgranskingardepil
- Tættari samstarv við danir, tá talan er um eitt nú okkara **landgrunskrøv** móti okkara grannum og tá vit gera nýggjar **handilssáttmálar**
- Tættari **samstarv við ríkisins sendistovur** um allan heimin
- Troyta allar møguleikar, har Ríkið kann verða við til at taka lut og stuðla nýggjum **mennandi verkætlanum** í Føroyum.

Samband við framtíðina – valið er okkara!



Hetta er tað, sum Sambandsflokkurin arbeiðir fyri
Hetta er tað vit fara á fólkatingsval uppá
Vit vóna, at tú ynskir at verða við

Vinalig heilsan

Kaj Leo Holm Johannesen
Formaður í Sambandsflokkinum